TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Umhvørvismálaráðið

Okkara j.nr.
25/08849-2

Málsviðgeri
Øssur Patursson

Tygara j.nr.

Uppskot til Løgtingslóg um veðurlagslóg

Ummælisskriv til løgtingslógaruppskotið

Víst verður til hoyringsskrivið hjá Umhvørvismálaráðnum dagfest tann 19. September 2025 viðvíkjandi "*Uppskot til Løgtingslóg um veðurlagslóg*".

Inngangur

Tórshavnar kommuna fegnast um, at eitt bindandi lógaruppskot verður lagt fram um veðurlagsarbeiðið í Føroyum, og at ein greið og lógarfest kós verður sett móti netto-null útláti av vakstrarhúsgassi í 2050. Hetta er eitt týdningarmikið stig á leiðini móti einum burðardyggum, grønum og framtíðartryggum samfelagi.

Kommunan tekur undir við, at arbeiðið verður skipað við 10-ára virkisætlanum, ið verða dagførdar fimta hvørt ár. Henda skipan gevur bæði støðugleika og smidligleika og minkar um ávirkanina av broyttari politiskari samanseting.

Manglandi stutttíðarmál

Lógin eigur at leggja eina greiða og haldgóða rammu um veðurlagspolitikkin, sum tryggjar eitt skipað og støðugt arbeiðslag. Virkisætlanirnar, nevndar í lógini, hava ein lyklaleiklut í hesum sambandi.

Tó kann tað verða trupult at tryggja framdrátt og ábyrgd, um ikki eisini stutttíðarmál verða ásett.

Tí verður mælt til, at lógin fevnir bæði um stutttíðarmál og langtíðarmál, og at mál fram til 2050 verða ásett í serligum lógum, sum eisini eru løgfrøðiliga bindandi.

Hetta er í tráð við tilmæli frá danska Veðurlagsráðnum[1], um at virkisætlanirnar, sum lýstar í lógini, eiga at verða samanhangandi við hesi stutttíðarmál, soleiðis at tær stuðla beinleiðis undir ásettu útlátisminkingarnar í nærmastu framtíð, ikki bert langtíðarmálið fyri 2050.

Altjóða veðurlagsnevndin IPCC[2] hevur staðfest, at:

> "(...)
> All global modelled pathways that limit warming to 1.5 °C (>50 %) with no or limited overshoot, and those that limit warming to 2 °C (>67 %), involve rapid and deep and, in most cases, immediate greenhouse gas emissions reductions in all sectors this decade."
> (...)"

Hetta leggur dent á, at stutttíðarmál og skjót minking í útláti í hesum tíðarskeiðinum eru avgerandi. Við hesum í huga tykjast orðingarnar hjá landsstýrinum um eina "støðuga" minking næstu 25 árini ikki at hava ikki nóg stórt fyrilit fyri alneyðugu skjótleikanum við útlátisminkingunum.

Manglandi bindandi ásetingar
Tað verður í lógaruppskotinum lagt upp til, at lógin skal vera bindandi, men tær ítøkiligu ásetingarnar, sum tryggja, at hon eisini fær beinleiðis virknað í praksis, eru ikki greiðar. Hetta merkir, at lógarinnar bindandi karakterur í veruleikanum kann vísa seg at vera avmarkaður.

Í grannalondum okkara eru slíkar ásetingar tó at finna. Til dømis er í bretsku Climate Change Act 2008 ásett, at:

> "(...)
> It is the duty of the Secretary of State to ensure that the net UK carbon account for the year 2050 is at least 100% lower than the 1990 baseline.
> (...)"

Talan er um eina greiða og beinleiðis rættarliga skyldu, sum tryggjar, at veðurlagspolitikkurin verður settur í verk við lógarfestari ábyrgd. Ein slík skipan hevði harumframt styrkt tað rættarliga haldførið og økt álitið á føroysku veðurlagslógina sum fyrisitingarligt og politiskt amboð.

Viðmerkingar til ásetingar og viðmerkingar í lógaruppskotinum
§ 1 – Endamál og karmar
Kommunan tekur undir við, at endamálið við lógini er at seta bindandi mál og tryggja eina samfelagsliga og fakliga kós móti grønum orkuskifti.

Tó verður mælt til, at ásett verða minstukrøv um fakligt grundarlag, dátusøvn, modellering og eftirmetingar –beinleiðis í lógini – fyri at tryggja, at veðurlagslógin ikki verður einans ein ætlanaryvirlýsing, men eitt reelt arbeiðsamboð grundað á haldgóðar vísindaligar metingar.

---

[1] Klimarådet, sí greinina "Sådan bliver klimaloven bindende.", https://klimaraadet.dk/da/nyheder/indlaeg-saadan-bliver-klimaloven-bindende
[2] (AR6 Synthesis Report: Summary for Policymakers – Headline Statements), https://www.ipcc.ch/report/ar6/syr/resources/spm-headline-statements/?utm_source=chatgpt.com

§ 2 – Langtíðarmál
Langtíðarmálið um netto-null útlát í 2050 er væl valt og í samsvari við altjóða sáttmálar.

Tó verður mælt til, at grein 2 fevnir um:

- *eina greiða ávísing til uppgerðarleistir og rokniskipanir (t.d. IPCC), og*
- *heimild til, at landsstýrisfólkið kann áseta reglugerðir um nágreiniligar uppgerðarmannagongdir.*

Hetta hevði styrkt álitið á árligar útlátsuppgerðir og gjørt eftirmetingar meira álitandi.

§ 3 – Virkisætlanir
Skipanin við 10-ára virkisætlanum, ið verða gjørdar fimta hvørt ár, og kravið um stigvíst framsøknari mál er jaligt, tí tá minkar hon somuleiðis um ávirkanina av broyttari politiskari samanseting.

Tað er umráðandi, tá ið nýggj virkisætlan skal gerast, at landsmyndugleikar ráðføra seg breitt við kommunurnar, sum allarhelst koma at vera av fremstu útinnarum av mongum veðurlagsátøkum.

§ 5 – Veðurlagsráð
Kommunan tekur undir við, at eitt óheft Veðurlagsráð verður sett á stovn at gera tilmæli, varskógva og luttaka í almenna orðaskiftinum.

Tó verður mett, at fíggingin til ráðsins, ásett til 300.000 krónur árliga, ikki røkka til eitt fakligt haldgott virksemi. Hetta umfatar ikki arbeiði við modellering, gransking og útgreiningum, umframt samsýning og tíðarnýtslu hjá limum, serliga um ráðið verður mannað við fimm limum.

Tí verður mælt til:

- *at lógin staðfestir, at starvsskipanin kann fevna um heimild til at seta óheftar kanningar og modelleringar í verki, og*
- *trygd verður fyri fígging til virkisætlanir og ítøkilig átøk eftir tørvi í komandi fíggjarætlanum.*

Tilmælini frá Veðurlagsráðnum fara at hava beinleiðis ávirkan á kommunurnar og tað nærumhvørvi, sum kommunurnar hava ábyrgd av at umsita og verja. Tí eigur Kommunufelagið eisini at fáa høvi til at velja lim í Veðurlagsráðið.

Hetta hevði tryggjað, at arbeiðið hjá ráðnum verður fakliga og fyrisitingarliga rótfest í mun til kommunalu veruleikarnar og tær praktisku avleiðingarnar av veðurlagspolitikkinum.

Um fígging og avleiðingar fyri kommunurnar
Lógaruppskotið hevur í sjálvum sær ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, men tað er greitt, at virkisætlanir og framtíðar átøk koma at hava týdningarmiklan búskaparligan og umsitingarligan týdning fyri allar kommunur.
Tí er neyðugt, at fígging og vegleiðing fylgja við frá landsmyndugleikunum, so ikki verður álagt kommununum einsamøllum at fíggja serfrøði, kanningar og verkætlanir, ið eru felags samfelagsmál.

Yvirskipað sjónarmið
Kommunan leggur dent á, at:

- *Lógin eigur at vera meira ambitiøs og taka støði í altjóða stutttíðarmálum;*
- *Útlát frá innfluttum vørum og byggitilfari eigur at verða partur av útlátsuppgerðum;*
- *Kommunurnar eiga at fáa stuðul og vegleiðing til at seta í verk grønar íløgur, so sum til landstreym, grøna ferðslu og endurnýtsluverkætlanir;*
- *Veðurlagsráðið eigur at hava møguleika at ráðføra seg um skynsama nýtslu av íløgum og menna lokalar royndir og vitan, ið kunnu nýtast tvørkommunalt.*

Niðurstøða

Tórshavnar kommuna tekur undir við lógaruppskotinum sum eitt neyðugt og jaligt stig á leiðini móti grøna orkuskiftinum og netto-null í 2050.

Uppskotið manglar ásetingar um stutttíðarmál og bindandi ásetingar, sum tryggja, at veðurlagspolitikkurin verður settur í verki í praksis. Uttan slík lógarfest mál og rættarligar bindingar verður torført at tryggja ein áhaldandi og ábyrgdarfullan framdrátt av veðurlagspolitikkinum. Hetta veikir bæði tað rættarliga haldførið og álitið á veðurlagslógina sum fyrisitingarligt og politiskt amboð.

Við greiðari heimild at seta óheftar kanningar í verk, tryggari fígging til Veðurlagsráðið og greiðari mannagongd millum land og kommunur, kunnu virkisætlanirnar gerast eitt fakliga haldgott og virkið amboð at fremja grønar broytingar í Føroyum.

Tórshavnar kommuna er klár at greiða nærri frá viðmerkingunum omanfyri um spurningar ella ivamál eru frá Umhvørvismálaráðnum, ella um lógarviðgerðin krevur tað.

Vinarliga
k.v.

Elsa Berg
borgarstjóri

Jóan Petur Hentze
kommunustjóri